Nordic Sustainable Construction

# Lärarhandledning: Farliga ämnen

**Tema**

- Vandamikil evni
- Endurnýtsla

**Mælt tíðarskeið**

1 tími



**TIGUL**

Undirvísingartilfar
til skeið um endurnýtslu
av tigulsteinum í bygging

## Innleiðsla

Tilfarið leggur fram evnisspesifikar vandar við vandamiklum evnum undir niðurtøkuarbeiði. Lærlingurin verður kunnað um tær almennu meginreglur, sum skulu fylgjast í sambandi við trygd, áðrenn niðurtøkuarbeiðið byrjar. Orsøkirnar til vandamikil evni, teirra staðseting og funktión í bygginingi verða lýstar við tí endamáli at geva lærlinginum betri førleika at kenna aftur arbeiðsstøður, sum kunnu innihalda vandamikil evni í framtíðini. Avleiðingarnar av at arbeiða óvardur við vandamiklum evnum verða eisini lagdar fram í tilfarinum.

Í sambandi við upplýsingarnar í tilfarinum er ein uppgáva, har lærlingurin skal kanna, um tað hava verið vandar við vandamiklum evnum í seinasta umvælingar- ella niðurtøkuarbeiði, sum tey hava sæð onnur fremja ella sjálvi hava fremjað.

Tilfarið miðar eftir at geva lærlinginum eina grundleggjandi fatan av evnisspesifikum konstruktiónum, har vandamikil evni kunnu vera til staðar, og hvussu tey ávirka arbeiðsumhvørvið.

Við at kanna nøkur av niðurtøkuarbeiðunum, sum lærlingurin kanska longu hevur framt, kann hetta geva lærlinginum eina fatan av, hvørjir vandar eru við hesum slagi av arbeiði. Í nøkrum førum fer lærlingurin at uppliva, at arbeiðsumhvørvið ikki er nóg trygt á virkinum og fær harvið møguleika at deila sína vitan við byggimeistaran og á tann hátt bøta um mannagongdina á virkinum og viðvirka til eina mentanarliga broyting.

Ein góð fatan av, hvat vandamikil evni eru, hvar tey finnast, og hvussu tey verða handfarin, er ein grundleggjandi partur av endurnýtslu, sum ikki er møgulig, um arbeiðsumhvørvið ikki er í lagi.

<u>Serstøk fokusøki:</u>

- Múrsteinskaminir
- Ytviðgerðir á múrsteinskonstruktiónum
- Glaserðir múrsteinar
- Asbest í flísaklístri

# Lärarhandledning: Farliga ämnen

## Fyrireiking

- Lærarin skal fyrireika eina verklagsroynd fyri tann lærling, sum ikki hevur nakra roynd sjálvur.
- Lærarin eigur at hava vitan um tjóðskaparligar leiðreglur fyri handfaring av vandamiklum burturkasti

## Lærumál

- Lærlingurin kann vera varin um, at arbeiðsuppgávan kann innihalda vandamikil evni (F1).
- Lærlingurin kann greiða frá grundleggjandi vanda við innihaldið av vandamiklum evnum í evnisspesifikum konstruktiónum (V2).
- Lærlingurin kann viðvirka til at avdúka, um arbeiðsuppgávan inniber vanda við handfaring av vandamiklum evnum (H1).
- Lærlingurin kann avgera, um serfrøðingar skulu kontaktast fyri at taka umhvørvisroyndir, áðrenn niðurtøka av ávísum konstruktiónum verður framd (H2).

## Innihald og endamál

Skrivaða tilfarið gevur lærlinginum vitan um vandamikil evni í múrsteinskonstruktiónum og avleiðingarnar av at arbeiða við evnunum uttan røttu fyrireiking og verju.

## Uppskot til undirvísingarætlan

Framløga frá læraranum (10 min.)

- Evnisspesifikk innleiðsla til vandamikil evni.
- Framløga av skrivaðu upplýsingunum um vandamikil evni í múrsteinskonstruktiónum.
- Framløga av verklagsroynd um lærlinganna egnu royndir við niðurtøkum - lærarin biður lærlingarnar geva dømi í felag.

Bólkaarbeiði (30 min.)

- Bólkarnir fara ígjøgnum skrivaða tilfarið.
- Bólkarnir verða samdir um, hvørji før fara at arbeiða við. 2-3 før.
- Bólkarnir fara ígjøgnum hvørt før og gera eina lista yvir møguligar vandar og trygdarhættir til at handfara hesar vandar.

Endi í felag(20 min.)

- Hvør bólkur leggur fram tað mest viðkomandi førið við vandum og trygd - lærarin skrivar hetta á tavluna.
- Út frá royndunum hjá bólkunum samanheftir lærarin vandamikil evni við at fylla møguligar vitanartrot hjá lærlingunum. Lærarin leggur dent á týdningin av røttum handfaring og rættindum hjá lærlingunum í sambandi við trygd á arbeiðsplássinum.

Nordic Sustainable Construction

# Lärarhandledning: Farliga ämnen

## Differentiering

Tað kann differentierast við atliti til bólkastødd og tal av førum, sum bólkarnir skulu arbeiða við.

Hetta eigur í stóran mun at verða bygt á talið av viðkomandi førum, sum longu eru í flokkinum. Haraftrat kann framløga hjá bólkunum av førum eisini gerast til eina framløgu, um enn meira fokus á evnið er ynskt..

## Afturmelding og meting

Lærarin gevur afturmelding bæði undir og eftir, at lærlingurin arbeiðir við undirvísingstilfarinum.